# Landsstýrið farið til verka

**Klokkan átta í morgun møtti nýggja landsstýrið til sín fyrsta arbeiðsdag. Løgmaður, Annika Olsen, Rósa Samuelsen og partvíst Johan Dahl royna seg fyri fyrstu ferð í landsstýrinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*



*Nýggja landsstýrið á fyrsta landsstýrisfundi: Helena Dam á Neystabø, mentamálaráðharri, Hans Pauli Strøm, heilsumálaráðharri, Rósa Samuelsen, almannamálaráðharri, Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, Kaj Leo Johannesen, løgmaður, Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri, Annika Olsen, innlendismálaráðharri, Johan Dahl, vinnumálaráðharri og Jacob Vestergaard, fiski- og tilfeingismálaráðharri*

Fríggjadagin 24. september kundi Sosialurin »presentera« nýggja landsstýrið soleiðis, sum tað kom at síggja út. Og snøgga viku seinni var so sama landsstýri veruleiki.

Mánadagur 29. september, á sjálvari Mikkjalsmessu, var so fyrsti arbeiðsdagur hjá nýggja landsstýrinum.

Klokkan tíggju í morgun helt landsstýrið á fyrsta sinni landsstýrisfund undir leiðslu av Kaj Leo Johannesen, løgmanni, og manningin var sjálvsagt øll møtt.

Í morgun, tá Sosialurin var í Tinganesi, var enn ikki greitt, hvar nýggi uttanríkismálaráðharrin, Jørgen Niclasen, hevði sína skrivstovu, men hetta verður korini greitt seinni á degnum. Hann skal hitta síni starvsfólk klokkan tvey seinnapartin, og tá er væntandi greitt, hvussu hølisviðurskiftini hjá Uttanríkismálaráðnum verða.

Tá vit fregnaðust um, hvussu drúgvur hesin fyrsti veruligi landsstýrisfundurin bleiv, var nýggi løgmaðurin okkum svar skyldugur.

– Eg havi jú ikki roynt hetta áður, so eg dugi ikki at siga tær, segði Kaj Leo Johannesen.

Fráfarni løgmaðurin, Jóannes Eisdesgaard, visti tó at siga, at fundirnir vanliga vardu um tveir tímar ella so. Altso fram til døgurða.



*Fráfarandi fíggjarmálaráðharrin, Karsten Hansen, hevði fleiri góð ráð at geva Jóannesi Eidesgaard, tá skifti var í Fíggjarmálaráðnum í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Helvtin óroynd

Men tað er kortini ikki bara løgmaður, sum er nýggjur í hesum hópi. Helmingurin av landsstýrisfólkunum hava ikki ella næstan ikki roynt hetta áður.

Johan Dahl sat í 21 dagar sum fiskimálaráðharri í 2003, áðrenn umstøðurnar noyddu hann frá, so tað er avmarkað, hvussu nógvar royndirnar vórðu.

Nýggju kvinnurnar á tingi eru eisini púra óroyndar í landsstýrinum. Rósa Samuelsen skal umsita Almannamál, og hennara skrivstovuhølir verða í fyrrverandi Almanna-ogheilsumálaráðnum undir somu lon, sum Hans Pauli Strøm, heilsumálaráðharri.

Eisini Annika Olsen er nýggj í landspolitikki, og somuleiðis eisini í landsstýrinum. Hon er sum kunnugt vorðin innlendismálaráðharri.

Hini fimm eru tó øll roynd í stýri landsins. Jóannes Eidesgaard, Jørgen Niclasen, Hans Pauli Strøm, Helena Dam á Neystabø og partvís Jacob Vestergaard hava fleiri ára royndir í Tinganesi.

Sum nevnt var fyrstu landsstýrisfundur hjá nýggju samgonguni í morgun, og sum skiltist var einasta mál á skránni nevndarbýtið í løgtingsnevndunum, sum eftir ætlan skulu veljast á løgtingsfundinum í morgin.

Sony Ecricsson C902i

**Septembertilboð**

Fartelefon við nógvum hentleikum, m.a. 5 MP myndatóli við blits og autofokus, Bluetooth, FM-útvarpi, MP3-spælara, vapp og myndaboðum. 512 MB minniskort fylgir við.

Fæst á vodafone.fo og í vodafone-handlunum.

**kr. 3795**



**Løtan er tín**

vodafone

ÁHEITAN

Órudd á Gomlu Rætt

Við hesum vil Landsverk heita á fólk um at beina burtur órudd eftir seg, sum liggur á økinum kring ferjuleguna á Gomlu Rætt, bæði á landi og sjógvi. Talan er um bingjur, bátar, kassar o.a.

Um hetta ikki er beint burtur innan 15. okt. 2008, verður tað gjørt fyri eigarans rokning.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*